Grundgeving fyri val av ársins virki 2013

Ja, so ber ikki til at pakka tað inn longur. Sum tit júst hava sæð, hevur dómsnevndin í ár avgjørt at velja P/F Vest Pack úr Vestmanna til Ársins Virki 2013. Fyritøkan varð sett á stovn í 1994, og høvuðsvirksemið er, umframt vørur til føroysku húsarhaldini, plast- og etikettframleiðsla til matvøruframleiðslu og aðra vinnu í Føroyum. Harafturat selur fyritøkan eisini eina rað av øðrum vørum til vinnuna.

Verandi eigarar keyptu og løgdu saman Vestpack og Farpak í 2007 og hava miðvíst arbeitt við at fáa betri rakstur og betri úrslit ár um ár. Og hetta er eydnast til fulnar, hóast marknaðarin tíðum hevur verið heldur turbulentur. Botnlinjan hjá fyritøkuni er seinastu árini betrað munandi.

Úrslitini hjá Vest Pack eru prógv um, at tað eisini ber til hjá smærri fyritøkum at skapa góð úrslit við miðvíst at leggja seg eftir at gera alt eitt sindur betur hvørt einasta ár. Hetta hevur haft við sær, at ognar- og eginpeningsavkastið hjá Vest Pack er millum tey bestu í Føroyum, og tað hevur rós uppiborið.

Tað nýggja buzz-orðið innan leiðslumenning er "eksekvering", sum einfalt merkir "tað tú gert fyri at røkka settum málum". Og hóast leiðsla og starvsfólk í Vest Pack í dagliga virkseminum kanska ikki tosa so nógv um eksekvering, er tað m.a. hetta, sum skapar góðu úslitini hjá fyritøkuni.

Ein av styrkjunum hjá Vest Pack er fleksibilitetur í framleiðsluni, har fyritøkan kann tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, og t.d. kann framleiða minni nøgdir til kappingarførar prísir. Harumframt kann Vest Pack eisini framleiða skjótt, tá ordrin hevur skund.

Hetta hevur haft við sær, at tað hevur eydnast lutfalsliga lítlu fyritøkuni úr Vestmanna at klára seg í hørðu kappingini við størri fyritøkur í útlandinum. Eisini uttanlands byrja tey at fáa eyguni upp fyri fyritøkuni úr Vestmanna, og 20-25 % av søluni hjá Vest Pack er nú til kundar uttanlands.

Tað er tó framvegis á heimamarknaðinum, at Vest Pack hevur meginpartin av virkseminum. Vest Pack luttekur í "Keyp føroyskt" átakinum, sum m.a. skal vísa á, at vit hava nakrar fyritøkur í Føroyum, sum framleiða dygdarvørur til ein kappingarføran prís. Posarnir hjá Vest Pack eru eisini væl dámdir millum fólk, ikki minst í hesum døgum, tá slaktið nærkast, og vit hava brúk fyri sterkum posum til tað, sum frystast skal. Ja, vit kunnu siga, at posarnir eru líka seigir sum vestmenningarnir sjálvir.

Úrslitini hjá Vest Pack kunnu tæna sum fyrimynd hjá okkum øllum: tað ber til at taka kappingina upp við útlendskar framleiðarar og klára seg væl. Eg eri tí fegin um at kunna ynskja Jóan Magnus Olsen og Áka Olsen frá Vest Pack tillukku við heiðrinum sum Ársins Virki 2013.